## Stórt fall í Asia

Partabrøvini fullu nógv á marknaðinum í Tokyo fall nógv í nátt, og Nikkei-vísitalið var fallið meiri enn fim prosent, tá handilin lat aftur í morgun. Samstundis vísa tøl, at hjólini í japanska búskapinum mala seinni, enn serfrøðingar hildu. Tað var ikki bara í Japan, at partabrøvini fullu í virði í nátt. Tað sama hendi á hinum stóru marknaðunum í Taiwan, Hongkong og Suðurkorea, skrivar Reuters. Har lá fallið eisini um fimm prosent.



## Seldi 100.000 ferðaseðlar ein dag

Á skrivstovuni hjá norska flogfelagnum Norwegian er hýrurin góður, tí meðan fjølmiðlar tosa og skriva um fíggjarkreppu, hevur felagið selt so nógvar ferðaseðlar sum ongantíð fyrr. Norwegian hevur heilt einfalt fingið eina flúgvandi byrjan upp á 2009, og ein einstakan dag seldi felagið meiri enn 100.000 ferðaseðlar, skrivar NTB. Leiðslan sigur, at felagið hevur ongantíð fingið eina so góða ársbyrjan, síðani tað bleiv stovnað fyri seks árum síðani.

# Íslandssáttmálin er eitt haft

**Eftir, at kreppan byrjaði eru íslendingar vorðnir nógv meiri kappingarførir enn føroyingar í byggivinnuni. - Hetta fer at skapa trupulleikar, sigur stjóri í byggifyritøku. Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharrin og fyrrverandi løgmaður, heldur Íslandssáttmálan vera eitt haft í løtuni, men at hann í øðrum førum er eitt haft fyri íslendingar**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Meðan landsstýrið seinastu tíðina hevur lagt stóran dent á at halda íløgum í gongd í Føroyum, fyri at tryggja virksemi í krepputíðunum, so verða tað helst íslendingar, sum taka mesta arbeiðið. Fyrsta dømi var Hovstunnilin, og tað næsta verður helst útbyggingarnar á Landssjúkrahúsinum. Í tí førinum var bíligasta føroyska fyritøkan heilar seks milliónir krónur dýrari enn bíligasta íslendska tilboðið.

- Vit síggja týðiliga ein tendens, har íslendingar eru nógv bíligari enn vit. Í sambandi við Landssjúkrahúsið fóru vit so langt niður í prísi, sum vit á nakran hátt kundu, men íslendingarnir vóru framvegis nógv bíligari, greiðir Jón Danielsen, stjóri í Articon, sum bjóðaði upp á Landssjúkrahúsið, frá. Hann leggur tó afturat, at teir ikki fara at blaka handklæði í ringin.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hendan støðan hongur saman við Íslandssáttmálanum, og at hetta ger, at íslendskar og føroyskar fyritøkur hava líka góðan møguleika at bjóða upp á arbeiðir í Føroyum.

- Mann kann siga, at Íslandssáttmálin er eitt haft fyri føroyingar í løtuni, men tað gongur eisini hinvegin, sigur Jóannes Eidesgaard. Hann leggur afturat, at hann vónar, at føroyingar verða við í arbeiðinum við Landssjúkrahúsinum, og at soleiðis var støðan við Hovstunlinum eisini.

### Geva útlendingum arbeiði

- Tað er løgi, at mann ger so nógv fyri at halda íløgukarminum uppi, tá mann gevur útlendingum arbeiðini. Tað verður spennandi at síggja, hvat fakfeløgini gera við hetta, men tað verða aðrar tíðir. Vit klára ikki at kappast við íslendingar í løtuni, og tí fara teir við øllum arbeiðunum, sigur Jón Danielsen. Hann leggur afturat, at mann skjótt fer at síggja, at føroyingar fara at standa á síðulinjuni, tí kostnaðarstøðið hjá íslendingum er so nógv lægri enn í Føroyum.

- Vit tosa um einar 100 krónur á muni á hvørjum arbeiðstíma hjá føroyingum og íslendingum, so tað sigur seg sjálvt, at vit ikki klára at kappast, sigur stjórin á Articon.

Jóannes Eidesgaard er samdur við Jóni Danielsen.

- Mann má bara staðfesta, at føroyingar ikki eru kappingarførir í løtuni, og hetta er prísurin fyri frían marknað. Men eg rokni við at undirleverandørar og so framvegis partvís verða føroyingar, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Bíligar íløgur

Hinvegin sær Jóannes Eidesgaard ein stóran fyrimun í, at kappingin verður so hørð.

- Vit tosa her um stórar íløgur, sum vit fáa gjørdar á ein bíligan hátt, sigur Jóannes Eidesgaard. Hann vísir samstundis á, at mann bjóðar út, fyri at halda kostnaðarstøðinum niðri.

Hinvegin greiðir Jón Danielsen frá, at kappingin í Føroyum alla tíðina hevur verið hørð.

- Vit hava alla tíðina verið í harðari kapping í Føroyum. Tað vit síggja nú er, at vit ongan møguleika hava at kappast við veiku íslendsku krónuna, sigur Jón Danielsen.



*Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri og fyrrverandi løgmaður, hevur verið sera errin av Hoyvíkssáttmálanum ella Íslandssáttmálanum, sum hann eisini verður nevndur. Nú kallar Jóannes Eidesgaard sáttmálan eitt haft, men greiðir frá, at hetta kann broytast*